# ur væl við

**FAKTA**

**Calarasi-missiónin**

Fleiri upplýsingar um hesa missiónina fáast frá Thomas Juul Askham, tlf. 312913 ella 282913.
Í leiðsluni siga umframt Thomas Juul eisini Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.
Peningur at stuðla verkætlanini í Budesti kann flytast á konto í Eik 9181-4252669, Føroya Banki 6460-1618549 og Suðuroyar Sparikassi 9870-1024028

gjørt í býnum Clincu. Vit høvdu lagt rennandi vatn til fólkið, og so høvdu nøkur hús fingið streym inn-lagdan.

Lat meg nevna og geva tær eina mynd av, hvussu korini eru hjá hesum fólkum. Leiðslan á sjúkrahúsinum gav okkum eina frágreiðing, hvussu tað virkaði viðvíkjandi sjúkrahúsi og sjúk-lingum.

– Vit høvdu 2500 innleggingar fram til oktober 2007

– Vit hava verið noydd at avvísa 4300 fólkum, tí hesi høvdu ongar pengar at gjalda við, tí tey hava einki arbeiði. So tú sært, at vit hava nógv at vera takksom fyri, at vit hava møguleika at verða hjálpt, eins og vit hava møguleika at hjálpa.

Fyri okkum, sum liva í yvir-flóðar samfelagnum, er torført at rúma, at nakar hevur tað soleiðis. Eg havi sjálvur sæð hetta og sjálvur upplivað tað.

Leiðarin greiddi okkum frá, at seingjarklæðini blivu klipt í fýra pettir og løgd undir sjúklingar, um eitthvørt bleiv gjørt í songina. So her er greitt, at teimum tørvar seingjarklæði.

Hann vísti okkum inn í goymslurúmið, har seingjar-klæðini lógu. Eg hugsi, at eitt vanligt húsarhald her á landi var betur fyri enn hetta sjúkrahúsið.

Vit tosa her um eitt sjúkrahús við útivið 100 seingjarplássum.

Støðan í køkinum var alt annað enn nýmótans. Tað var ein vanligur gasskomfýrur, so sum vit kenna teir til eitt vanligt húsarhald her heim. Tað var tað, sum høvdu at kóka við og gera mat til øll hesi 100 fólkini.

Á komfýrinum stóð ein stór grýta, sum fevndi um øll fýra blussini. Hølið annars hevði tørv á stórum ábøtum av ymiskum slagi.

Tað vildi glett, um onkur kundi sponsorerað pening til at kunna keypa nýggjan komfýr til sjúkrahúsið, somuleiðis um onkur vil vera við at sponsorera seingjarklæði, dýnur, koddar, dýnubetrekk, seingjarløk – ja, tað sum skal eina song. Tað nýtist ikki at vera hvítt á liti. Tað skal bara vera reint og ikki slitið.

Á myndunum frá køkinum eru fleiri smærri grýtur at síggja. Hetta eru grýtur og onnur køksútgerð sum er úr Føroyum.

### Havnarmaður við róðrið

Tað var so heppið, at eg fekk at vita um ein havnarmann, ið búði í Danmark og sum møguliga kundi gera henda túrin fyri okk-um. Eg fekk navnið á manninum, – eftirnavnið segði mær meiri enn fornavnið. Navnið Ljósheim segði mær, at hesin maðurin kundi óivað taka undir við sanginum: So langt eg kann minnast, so havi eg hoyrt.

Eg setti meg í samband við Eyðun Ljósheim, ein fryntligur maður at tosa við. Hann greiddi mær frá, at hann hevði fast arbeiði og at hann vildi kanna møguleikan at gera henda túrin. Tað gingu nakrir dagar, so játtaði hann at gera túrin niður fyri okkum. Og fríggjadagin 30. mars løgdu vit leiðina móti Rumenien.

Eyðun er ein vandur bilførari. Hann hevur koyrt rættiliga víða við vøru, serliga til londini eystanfyri, bæði úr Føroyum og úr Danmark, so hann veit alt um pappír og annað sum er vert at vita í hesum ymisku londunum.

Henda fríggjadagin hevur Eyðun verið í Hirtshals og fingið bingjuna í bilin. Hann tók meg upp á vegnum til Videbæk. Vit koyrdu síðani til Vejle, har Eyðun býr saman við konuni og tveimum dreingjum.

Kona Eyðun er úr Ukraina, ein still og fryntlig kvinna. Hon gav okkum ein drekkamunn. Hetta var klokkan 4 um náttina. Vit byrjaðu síðani at koyra móti Padborg, har vit komu um 6-tíðina um morgunin.

Vit gera av, at vit skulu sova í bilinum. Hetta er nakað nýtt fyri meg. At sova í bili havi eg ikki roynt áður, men tað vísti seg at bera væl til.

At skriva í smálutir um túrin er ov drúgt og helst keðiligt fyri lesarin. Men tó kann eg ikki lata vera við at steðga við eina hending. Fyri mær var hon ikki sørt skemtilig.

Tá vit vóru komnir nakað um markið til Slovakia, verður gjørt eitt chekk av ferðsluni, bæði inn og út úr landinum.

Hetta var seint á kvøldi. Tað ver sera myrkt, og út úr myrkrinum møtir okkum ein lýsandi politistavur og ein vælmerktur politimaður. Hesin veittrar okkum út til síðuna. Hann er ikki stórur á vøkstri, men røddin er skingrandi. Hann dugdi so at siga einki at siga á enskum.

Hesin kannar pappírini, og lesur upp á bilrútin. Tað vísir seg, at vit hava ikki varnast skeltið har tað stóð, at vit skuldu gjalda veggjald. Í rútinum átti ein pappírslepi at hingið, og sum segði at vit høvdu goldið veggjald.

Tað sum politimaðurin ikki visti var, at Eyðun hevði fingið ein porsjón av treiskni í vøggugávu. Teir báðir tosaði nógv og leingi saman. Báðir førdu hvør sítt mál. Út úr myrkrinum hoyri eg politimannin brúka orðið "Straff-straff".

Hetta fær ikki Eyðun at rista í brókunum. Undir samrøðuni hevur Eyðun bjóðað politimanninum kleynur fyri at koyra víðari. Nei, tað bar ikki til. Endin á hesum bleiv, at Eyðun og politimaðurin hoyrdu so fittir til markið, og so bleiv koyrt víðari. Jú, vit høvdu tað hugnaligt á ferðini. Eyðun er ein sera dugnaligur bilførari. Veit tað mesta sum vert er at vita um pappír – rutur og annað. Ein maður sum føroyingar áttu at brúka til víðari farm á meginlandinum.

Jú, vit høvdu tað skemtiligt til tíðir á túrinum. Vit takka Eyðuni mangar gangir fyri hjálpsemi og beinasemi at gera henda túrin fyri okkum.

Undirritaði, saman við Asbjørn Niclasen og Sverra Kjærbæk sum mynda leiðsluna í Calarasi-missiónini, vilja ynskja øllum sum hava stuðlað arbeiði okkara á ymiskan hátt eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

## Ein føroysk verkætlan

Lat meg gera púra greitt og sláa fast, at hetta er ein fult út føroysk hjálpar- og menningarverkætlan.

Vit eru tríggir sum standa fyri hesi verkætlanini. Tað eru Asbjørn Niclasen, Sverri Kjærbæk og undirritaði. Vit hava eitt tætt samstarv við tað lokala fólkið. Vit arbeiða saman við pastor Daniel Banu, og vit hava samstarv við teir kommunalu myndugleikarnar á staðnum.

Vit fylgja sjálvir arbeiðinum sum vit gera í Rumenien upp. Vit eru fult út vitandi um tað sum verður sent úr Føroyum, og vit tryggja at tað kemur á rætta staðið.

Lat meg nýta høvið her at takka tykkum, sum gjørdu tað møguligt at fáa hesa bingjuna við sjúkrahúsútgerðini til Budesti:

Hallmar Winther, Skopun
Handilshøllin v. Sámal H. og Kristu Lognberg, Skopun
Búrhandilin v. Kristoffur Poulsen, Skopun
Rólant Vidtfelt, Sandur
Bakaríið á Sandi, Sandur
Shell, Havn
Skipafelag Føroyar, Havn
Missiónshúsið í Skopun
Missiónshúsið Libanon, Sørvágur
Soli Deo Gloria, Klaksvík
J. & K. Petersen, Havn

Hjartans tøkk øll somul. Tit hava verið við til at glett tey, ið ikki hava teir stóru midlarnar og møguleikarnar.

## Listi yvir útgerð, tiltøk og umvæl-ingar á Budesti sjúkrahúsinum

Í oktober mánaði fekk Thomas Juul handaðan henda listan, tá hann var á vitjan á sjúkrahúsinum:

Umvæla núverandi hegn rundan um ognina ella seta nýtt upp
Umvæla kloakk og frárensl
Umvæla el-kervið og seta nýtt upp
Hitaverk og heittvatnsleiðing
Leggja gassrør til eina barakk og seta radiatorar upp
Umvælingar á lungnadeildini
Umvæla tak, takrennur, frárensl
Nýggjar møblar til skrivstovuna
Nýggjar sengur og náttborð
Nýggjar sofur
Nýggjar stólar til bíðirúmini
Læknabriksir
Framkomna tøkniliga útgerð til viðgerð og kanningar
Laboratorium-útgerð
Turkiskáp
Køliskáp til køkin
Stór eimhetta til køkin
Køli- og luftanlegg
Teldur
Ein bygning, sum er atskildur frá restini av sjúkrahúsinum. Hesin bygningurin skal nýtast til ambulatorium. Grundin er gjørd, eins og kloakk og vatnrør.

Leiðslan sigur í sínum skrivi, at um hesi punktini verða gjøgnumførd, kundu tey fingið væl útbúgvin starvsfólk, og kundu tey tískil bjóðað høga góðsku og tænastu.



*Umstøðurnar inni á sjúkrahúsinum eru alt annað enn góðar. Hesar báðar kvinnurnar klaga kortini ikki, men eru fegnar um alla ta hjálpina sum sjúkrahúsið fær úr Føroyum*